# Bjarga honum, meðan tú kanst

## Tórshavnar kommuna ruddar upp á almennum økjum



Tórshavnar kommuna fer nú undir at rudda upp á øllum almennum vegum og økjum, sum kommunan ræður yvir.

Talan er um akfør, bátar, reiðskap, amboð og tílíkt, sum fólk hevur sett frá sær, men sum einki frámerki hevur um, hvør eigarin er.

Heitt verður á øll, sum hava slíkar lutir standandi á kommunalum økjum, um at beina teir burtur sum skjótast og innan eina viku.

Lutir, sum ikki eru burturbeindir í seinasta lagi 7. juli 2008, verða burturbeindir av Tórshavnar kommunu uttan aðra ávaring.

Tórshavnar kommuna tekur samstundis fyrivarni fyri at krevja allar útreiðslur í hesum sambandi endurgoldnar frá eigaranum.

Heitt verður eisini á øll, sum hava slíkar lutir á privatum økjum, og hesir kunnu metast sum órudd, um at beina teir burtur sum skjótast.

**Tórshavnar kommuna**

# VÆLKOMIN Á VARMAKELDU

**4.- 6. juli 2008**

**Varmakeldustevnan í Fuglafirði er vanliga merkt av mongu metanarligum tilboðum, og stevnan í ár er onki undantak.**

Listaframsýning er í Arbeiðsmannafelagshúsinum. Í Gallarí Ribarhús er málningaframsýning, og listarmaðurin Helgi Midjord skipar saman við øðrum fyri konsert í hølunum leygardag og sunnudag.

Mentanarhúsið verður allar dagar á tremur við breiðum úrvali av tónleiki. Fríggjadag verður byrjað kl. 20 við Rúna Hentze, Helga og Niels og seinni verður dansur við Eager to Please. Sunnudagin verður byrjað kl. 16 við Onnu Nygaard og Duritu Mohr Jacobsen frá Ársins Songrødd og Bárði á Lakjuni.

Leygdardagin 5. juli heldur Fuglafjarðar kommuna 90-ára dag í Mentanarhúsinum. Kl. 10-12 verður byrjað við morgunmati fyri øllum borgarum, og kl. 17 verður hildið áfram við ókeypis tónleikatiltaki. Tey luttakandi vera Óli Jóhannesen, Petur Háberg, Budam og Finnur Jensen. Eftir hátíðarhaldið verður skipað fyri dansi har Eager to Please spælir.

Sí annars Varmakelduskránna á www.fuglafjordur.fo, har upplýsingar eru um eitt nú framsýningar, tiltøk hjá Siloa, Thabor og kirkjuni, dansin í Ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið og um dystirnar í Formuladeildini.




# Útbering av dagbløðum og reklamum



## LEYST STARV

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út á

**Klaksvík**

Ert tú 13 ár ella eldri, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 35 14 05** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost: **utbering@prent.fo**

**Prentmiðstøðin**

Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 34 14 00 · Útbering tel 35 14 05 · Fax 35 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo